## Andrew skoraði í stórtapi

Tað var ein torfør uppgáva, ið Fremad Amager fekk í dag, tá ið liðið skuldi á vitjan hjá Næstved. Næstved lá undan dystinum á 5.plássi, og hevur eina uppflyting at berjast fyri. Tað vórðu eisini favorittarnir, ið struku avstað við sigrinum. Heili 5-1 ljóðaði sigurin á. Føroyska ljóspunktið var tó, at Andrew av Fløtum skeyt einasta málið hjá Fremad. Andrew varð innskiftur í hálvleikinum, og tíggju minuttir seinni hevði hann sett bóltin í netið. Hinir føroyingarnir á liðnum, Jónas Tór Næs og Tem Hansen, leiktu allan dystin.



## AaB útsetti FCK-veitslu

Við einum sigri á AaB um vikuskiftið, kundi FCK endurvunna meistaraheitið. AaB hevði somuleiðis sakir at berjast fyri, av tí at teir bert vóru tvey stig aftanfyri nummar tvey. Tað byrjaði annars at anga av gulli í 17. minutti, tá ið svenski Tobias Linderoth legði meistararnir á odda. Leiðslan helt sær til gott ein tími var leiktur, tá ið AaB fekk fýra gyltar minuttir. Fyrst javnaði Jeppe Curth við einum skallara, og bert fýra minuttir seinni legði SAS Liga-toppskjúttin, Rade Prica, AaB á odda 2-1. Eftir hetta sat FCK fullkomiliga á dystinum, men hóast stórar málmøguleikar megnaðu teir ikki at skora. Súni Olsen kom á vøllin ímóti endanum av dystinum.

Skála-KÍ 1-0 (1-0):

# Stigini skola í Skála sekkin

*Skála*

*KÍ*

**Hesa ferð spældu skálamenn seg til fulla úrtøku ímóti klaksvíkingum, sum ikki funnu rætta hugburðin og ikki fingu samanspælið at rigga**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*




*Fjórði sigurin á rað hjá Skála varð veruleiki sunnudagin. Hóttandi niðurflytingin tykist longu gloymd, og nú verður strembað fram á við fullari ferð*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Krepputosið og hóttanina um niðurflyting sást einki til á Skála sunnudagin. Í hvussu so er ikki hjá heimaliðnum. Skálamenn eru eftir trimum vikum broyttir frá flokki av trilvandi einstaklingum við lítlum sjálvsáliti og til væl samanhangandi lið, ið er eyðkent av spæligleði og stórum sjálvsáliti, sum kemur til sjóndar í, at spælararnir flyta seg væl og nógv, bjóða seg til og fegnir vilja hjálpa honum, sum hevur bóltin. So stóra ávirkan hevur venjaraskiftið á Skála havt!

Hjá klaksvíkingum er mynstrið, sum tað hevur verið. Teir arbeiða við fullari ferð aðru hvørja ferð, og aðru hvørja ferð er hugburðurin ikki nóg góður og harvið leikliga avrikið ikki tað, sum tað kann roknast við av liði, sum fegið vil vera við, har tað er stuttligast at kappast.

Skála skoraði málið, sum tað eftir dystarenda vísti seg at hava virði av trimum stigum, tá ið 20 minuttir vóru farnir. Teir báðir Skála spælararnir, sum meiri enn nakrir aðrir vóru profilarnir á heimaliðnum, vóru meistarar fyri málinum.

Alexandur Johansen, sum í útgangsstøðuni var miðvallari í vinstru, men reikaði heilt nógv, sneiddi framvið fleiri. Eftir kontra støkk bólturin til Paula G. Hansen, sum úr 20 metrum sendi upp um eitt sindur uttarlaga stadda og ikki heilt sakleysa KÍ málverjan og dygst undir tvørtræið.

### Pauli við aftur

Tríggjar tær fyrstu ferðirnar eftir at John Petersen fekk um stýrisvølin á Skála, var uppstillingin hvørja ferð tann sama. Tað bar eitt nú við sær, at liðformaðurin, Pauli G. Hansen, hevur sitið á beinkinum og bara hevur spælt seinna partin av 2. hálvleiki.

Hesa ferð var neyðugt at broyta uppstilling. Arnhold Berg var ikki førur fyri at spæla, og so varð pláss fyri liðformanninum. Poul Poulsen varð fluttur av miðvallarplássinum í høgru og aftur á vinstra vongverjan, Levi Hanssen varð fluttur av sentralum plássi á miðvøllinum og út í høgru, og harvið var pláss fyri generalinum og liðformanninum undir liðini á stríðsmanninum Pæturi Dam Jacobsen mitt á miðjuni.

Pauli G. Hansen tók av møguleikanum. Eitt er, at hann skoraði sigursmálið. Hin parturin er, at hann í sínum eyðkenda stíli fangaði eina rúgvu, bakkaði væl upp og dugdi væl at stýra.

Útlendingarnir í fremstu røð – Kaplanovic og Oby - arbeiddu nógv, og bæði undan og eftir steðgin komu teir til upplagdar málmøguleikar, men teir megnaðu ikki at fáa mál. Eina ferð misskiltu teir hvønn annan í upplagdari støðu, og í síðsta minutti bjargaði KÍ málverjin sera væl.

### Aldudalurin

Meðan Skála er á aldukambinum og við sigrinum tók seg framum KÍ, so vísti avrikið hjá klaksvíkingum, at har er ikki væl vorðið.

Trupulleikar vóru í miðverjuni, vongverjarnir vóru ongantíð við í uppbyggjandi spælinum, royndirnar at samanspæla tættmiseydnaðust, tí møguleikarnir fyri stuttum sendingum vóru fáir og neyvleikin lítil, og so varð ofta roynt við longum og vónleysum sendingum úr aftastu og fram í fremstu røð.

Løtuna undan einasta málinum tóktist tað sum um, at KÍ hevði viljan at samanspæla. Kristian á Lakjuni var sjónskur sentralur miðvallari, og í fremstu røð stríddist Paul Clapson støðugt.

Í 2. hálvleiki, tá ið KÍ slepti í verjupartinum, høvdu teir eina forkølaða skotroynd ímóti málinum og tveir stútarar, sum fóru omanfyri. Skála verjan las spælið væl og uppgávan broyttist ongantíð, tí KÍ broytti lítið og einki.

Fýra dystir, tólv stig og gott lag á Skála. Í Klaksvík hava teir skavað tíggju stig saman, og tað er væl skiljandi, um lagið eftir ferðina út á Skála ikki er nakað serligt.

## Bólturin er framvegis trillrundur

**Argjamenn staðfestu hesa ferð, at tað enn er pláss fyri sensatiónum, og oddaliðið var eina løtu undir trýsti á heimavølli ímóti botnliðnum**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Sunnudagurin var góður fyri Skálafjørðin. Í teimum báðum uppgerðunum, har tað frammanundan varð roknað við tættastu stríðunum, vóru tað liðini úr Runavíkar kommunu, sum fingu úrtøkuna. Skála sendi KÍ norður aftur við ongum, og NSÍ fór úr Sarpugerði og um Gøtueið við øllum.

Hesi bæði úrslitini bera við sær, at NSÍ aftur hevur krókt seg upp í heiðursmerkjastríðið, og at Skála hevur gravað alt tos um kreppu og hóttan um niðurflyting væl og virðiliga niður.

Í Klaksvík og í Gøtu er verri vorðið. Botnurin er ikki so langt burtur, fleiri spælarar eru skaddir, útlendingarnir, sum tað varð vónað skuldu gerast lyklaspælarar, hava ikki megnað tað, sum vónað varð og eru á veg av landinum, og tí er einki at siga til, at lagið ikki er nakað serligt.

Í 9. og síðsta umfari í fyrsta triðinginum av kappinguni hittast KÍ og GÍ í Klaksvík!

Á Sandi og í Streymnesi lagaði tað seg soleiðis, sum tað frammanundan varð roknað við. B36 og EB/Streymur fingu fult, og harvið er EB/Streymur oddalið, og B36 er framvegis fremsti avbjóðarin.

B71 vísti enn eina ferð, at sandoyingar hava gott tak á spælinum í Formula deildini. Samstundis vísti gongdin enn eina ferð, at tað gongur ógvuliga striltið hjá B71 at fáa úrtøku á heimavølli.

VB/Sumba er í løtuni fremsta evnið til niðurflyting. Gongdin á útivølli seinastu vikurnar kundi tó boðað frá, at tað væl kann henda seg, at VB/Sumba ímóti minni stinnum liðum við minni álopstyngd kann ogna sær stig. Í Runavík, í Gundadali ímóti HB og aftur í Streymnesi hava suðuroyingarnir havt góða úrtøku burtur úr møguleikunum.

Størsta áminningin um, at tað framvegis loysir seg hjá teimum, sum eru dømd niður og norður, við góðum hugburði at stríðast ímóti teimum stóru, var á Argjum. Hagtalsliga er HB omaná ímóti øllum feløgum. Undantakið er AB. HB og AB hava spælt eina ferð ímóti hvørjum øðrum í fremstu røð, og hagtølini siga 2-2!

9. umfar verður á skránni um eina viku. Sera áhugaverda uppgerðin í Gundadali, har HB fer at fáa vitjan av EB/Streymi, verður sambært skránni mánakvøldið 14. mai. Hinir dystirnir verða sunnudagin.

John Petersen og Skála skulu eftir fýra ferðir trý stig og samlaðan málmun upp á 7-0 í Gundadali at spæla ímóti gomlu liðfeløgunum hjá John í B36. B71 skal til Vágs, KÍ fær vitjan av GÍ, og NSÍ kann við sigri á AB fáa møguleika rættiliga at leggja seg út í oddastríðið.

Higartil hava tað av og á verið úrslit, sum hava mint á, at bólturin framvegis er trillrundur. Soleiðis var tað í 8. umfari, og um eina viku fæst at vita, um onkur favorittur enn eina ferð verður fyri vónbroti.